Havsbrún byggir út

Stórt byggivirksemi er á keiøkinum í Fuglafirði í hesum døgum.

Havsbrún er í ferð við at byggja eina stóra fóðurgoymslu og eina silo- og blandistøð.

Fóðurgoymslan verður einar 1700 fermetrar, og hon er fyrra byggistig av tveimum. Ætlanin er, at hendan bygging skal halda fram, tá ið havnin er víðkað longur úteftir eystara armi.

Fóðurgoymslan verður eitt stórt framstig fyri Havsbrún, sigur Bergur Poulsen, stjóri. Tá goymslan verður liðugt kann fóður goymast í stórum nøgdum á einum staði, og hetta verður meira lønandi fyri fyritøkuna, sigur hann.

Í blandistøðini verður fóðurið sett saman til tann rætta blandingin. Har fara at standa 20 siloir, sum verða einar 30 metrar høgar.

Ætlanin er, at byggingin, sum nú eru í ger, skal vera liðug í ár.

Vinstru megin verður ein silo- og blandistøð, og høgrumegin verður fóðurgoymslan. Myndin er tikin fyrr í mánaðinum.

Bouquet Hanus & Aldubáran

Blómubrúgv millum fólkaligt og klassiskt

Pauli í Sandagerði ummælir nýggju fløguna hjá Hanusi Johansen

Hanus er gamal í garði í norðurlendska fólkatónaheiminum, og Aldubáran er óivað okkara boð upp á eina klassiska tónabouqet.

Hvør í sínum lagi hava hesir snillingar fyri langari tíð síðan prógva dirvi og virði, men saman?

Taldist millum teirra, ið kanska ivaðust eitt sindur. Fyrsta royndin á palli var kanska eisini eitt sindur leitandi.

Men!

Lukkutíð fyri okkum øll, góvust tey ikki á hondum, og úrslitið av hesum dirvi gjørdist ein sonn bouquet av tí allarbesta frá tveimum heimum.

Løgini

Havi haft tann framíhjárætt at spælt og virkað saman við Hanusi í mong ár. Sjáldan havi eg sæð styttri veg millum djúpar kenslur og ljómandi lag.

Havi eygleitt fólk í mongum londum, tá Hanus við síni eyðkendu og sonnu rødd hevur málað eina bleyta ella mergjaða mynd í rúmið — uttan mun til málkunnleika ella húðarlit hava allir áhoyrarar speglað somu mynd í eygunum.

Hanus skapar ofta sera einføld løg, men kortini er eingin ivi um, at hetta er Hanus og eingin annar. Løgini sita sera væl og eru sera trúgv móti orðunum. Onkuntíð kennir tú tárini leita sær fram móti eygnakrókunum, í øðrum førum kennir tú sjálvan fanan anda teg kalt í nakkan, meðan okkurt lagið fær teg flenna í kíki.

Fleiri av løgunum á hesi fløgu eru kend av mongum, og nøkur eru eisini at finna á aðrari útgávu, men nýggi búnin gevur løgunum nýtt og spennandi innihald.

Útsetingarnar

eru sera fjølbroyttar. Fleiri av leikarunum hava sett út, og hetta ger fløguna spennandi.

Nakrar útsetingar bera brá av klassiskum uppruna meðan aðrar eru meira at kalla skipað improvisatión. Vakur er búnin, ið Kári Bæk hevur latið sorgblíða sangin, **Saknur**, í. Eisini hevur Páll Sólstein verið heppin við síni mynd av sera vakra sanginum um **Blómuna** hjá Poul F.

Ikki sørt av skemtingarlyndi er eisini at finna í onkrari útseting — m.a. í frálíku útsetingini hjá Edvardi Nyholm Debess av **Maritu**, ella har Stamen Stantchev loyvir gamla Beethoven inn í sangin um **Lívið**

Sum heild eru útsetingarnar væl greiddar úr hondum og stiðja væl upp undir løgini.



Framførslan er sera hugtakandi

Talan er um livandi ljóð, so upptøkurnar hava eisini fingið við okkurt, ið lúkað hevði verið burtur í einum upptøkuhøli.

Onkur tóni hevur hug at ilskast inn á annan, ið ikki røkkur røttu hæddina, og í einstøkum førum er klassiska stevið heldur stirvnari enn tað fólkaliga.

Men tílíkt ger bert fløguna meira livandi og sanna.

Á hesari fløgu spæla menniskju, og vit ið lurta fáa loyvi at lurta og uppliva sum menniskju.

Sonn spæligleði eyðkennir fløguna frá byrjan til enda, og í tónaheiminum er einki meira lívgandi enn fólk, ið tykjast at spæla fyri sína egnu skuld.

Hanus er kletturin, og á hann byggir Aldubáran sína tónaborg.

Upptøkurnar

eru somikið góðar, at tú við hvørt ivast í, um okkurt av løgunum er tikið upp í einum upptøkuhøli.

Ikki er lætt at fáa fatur á øllum smálutum, tá talan er um konsertupptøku, so her má sigast at gløgg og heppin hond hevur flutt knapparnar.

Ljóðblandingin er eisini góð

Hanus fær góða rúmd í ljóðmyndini, meðan ljóðførini í allar flestu førum standa glar og kortini saman í góðum samljóði.

Fái eisini hug at nevna vakra húsan, ið tónleikurin er klæddur í. Astrid Andreasen hevur hegnisliga valt og mynda eina bouquet av okkara heimligu plantum. Húsin er einfaldur og vakur, men handan friðsæluna lúra tistlar og tornir.

Eitt sera gott hugskot og ein kærkomin gáva til okkara, ið leingi hava longst eftir nýggjari útgávu frá Hanusi ella Aldubáruni.

Við hesi fløgu fingu vit í posa og sekk.

Ókeypis Summartónar á bygd

Í ár sleppa fólk ókeypis til konsertirnar hjá Summartónum á bygd, me›an ta› sum vanligt skal gjaldast fyri konsertirnar í Havn. Tónleikur eftir Johannes Brahms er altjó›a tema á hesi tónleikastevnuni

Dia Midjord

Summartónar fara í holt vi› seinasta vers, tá tónleikastevnan byrjar komandi fríggjadag. Næsta summar ver›a allar tær føroysku tónleikastevnurnar koyrdar í ein pott, sum n‡stovna›a Listahátí› Føroya fer at samskipa. Jazzur, kórsangur og klassiskur tónleikur ver›ur tá um somu tí›.

Hesafer› ver›a konsertirnar á bygd ókeypis. Tiltaki› Summartónar er ein t‡›andi partur av føroyskari mentan og tí ver›ur roynt vi› ókeypis atgongd á bygd.

Orknoyggjar fyrimynd

Eins og undanfarin ár er Kristian Blak undangonguma›ur, tá skipast skal fyri. Hann er eisini ma›urin, sum í 1992 byrja›i vi› hesum tiltaki. Líknandi tiltøk í Orknoyggjunum og Hetlandi eru brúkt sum fyrimynd til føroysku útgávuna.

Kristian Blak sigur, at ta› hevur stóran t‡dning, at bæ›i útlendingar og føroyingar eru at hoyra á slíkari tónleikastevnu.

– Ta› er lættari at bjó›a fram eina skrá, har bæ›i føroyingar og útlendingar eru vi›. Ta› vísir seg, at ta› á henda hátt er lættari at kn‡ta samband millum tónleikarar og áhoyrarar. Umframt geva útlendsku gestirnir okkum møguleikan at fáa fatur á ø›rum útlendskum tónasnidlingum.

Ta› er Nor›urlandahúsi› saman vi› felagnum føroysk tónaskøld, i› skipar fyri og leggur tónleikastevnuna til rættis.

– Summartónar er t‡›andi partur av føroysku mentanini og tí hevur ta› t‡dning at konsertirnar ver›a hildnar kring alt landi›, sigur Helga Hjørvar, stjóri í Nor›urlandahúsinum.

– Nor›urlandahúsi› er jú fyri allar Føroyar og ikki bert fyri Havnina, leggur hon aftrat.

Framføra stórverk

Tónleikastevnan Atlantsljómur ver›ur hildin samstundis sum Summartónar. Hæddarpunkti› er stórverki› “Ein Deutsches Requiem” hjá Johannes Brahms.

Av teimum 52 tónleikarunum eru 13 yrkistónleikarar úr Eysturríki. Restin er samansett av norskum og føroyskum stuttleikatónleikarum. Kóri› er manna› vi› okkurt um 100 sangarum. Solistar eru Berghild Poulsen, sopran og Lars Thodberg Bertelsen, bariton.

Verki› ver›ur stjórna› av Yaacov Bergman. Hetta er sami dirigentur sum stjórna›i á tónleikastevnuni hjá Atlantsljómur í 1998. Yaacov Bergman fær nakrar dagar at venja og samansjó›a kór og orkestur. Framførslur av stórverkinum vera leygar- og sunnudagin 1. og 2. juli.

Atgongumerki til konsertirnar kunnu keypast á sta›num ella í forsølu í Nor›urlandahúsinum. Kirkjukonsertirnar og konsertirnar á bygd eru ókeypis.

Helga Hjørvar stjóri í Nor›urlandahúsinum og Kristian Blak bjó›a vælkomin til Summartónar 2000. Í ár eru konsertirnar á bygd ókeypis

Heimskendur sangari vitjar Summartónar

Baritonsangarin Håkan Hagegård skal framføra á Summartónum 2000. Tónleikastevnan ver›ur kring landi› frá 23. juni til 3. juli

Umframt luttøku úr Eysturríki eru øll Nor›urlond umbo›a› á tónleikastevnuni Summartónar, sum byrjar komandi fríggjadag. Eins og undanfarin ár eru ta› tónleikarar á høgum stø›i, i› syrgja fyri at konsertirnar eru stórar at uppliva. Men eisini úrvali› av tónlistaverkum ger, at her er eitt sindur fyri øll.

Hetta er eisini tónleikastevnan, har vit sleppa at hoyra tónleik frá okkara egnu tónaskøldum, og fleiri føroysk verk ver›a frumframførd. Føroysku tónleikaskøldini, i› luttaka, eru Pauli í Sandáger›i, Atli Petersen, Tróndur Bogason, Edvard Nyholm Debes, Kristian Blak, Kári Bæk og Sunnleif Rasmussen.

Allir tónleikararnir á Summartónum eru á einum sera høgum stø›i og nógvar gó›ar og forvitnisligar framførslur eru í væntu. Nevnast kunnu millum onnur Sergei Azizjan og Elena Semishina á piano, kendi svenski sangarin Håkan Hagegård vi› pianisti, Blásarakvintett Reykjavíkar og kóri› Hymnia úr Danmark.

Av okkara egnu tónleikarum ver›a hesi at hoyra og síggja: Anna E. Klett, Johannes Andreassen, Elsa S. Dalsgar› og Joana Johansen.

Tvey nor›urlendsk tónaskøld eru eisini til sta›ar og fáa verk framførd á tónleikastevnuni í ár. Tey eru danin Ib Nørholm og íslendingurin Atli Heimir Sveinsson.

Í sambandi vi› Summartónar 2000 er komin út ein skrá, har allir uppl‡singar um tiltøk, tónaskøld og tónleikarar eru at fáa. Skráin fæst í Nor›urlandahúsinum, TUTL og í kunningarstovunum kring alt landi›.